


# ÁRSFRÁGREIÐING 2025

LANDSBÓKASAVNIÐ

**Ársfrágreiðing 2025**
Útgevari: Landsbókasavnið
Tórshavn 2025
ISBN: 978-99918-61-06-7






**4** **INNGANGUR**

**5** **UM LANDSBÓKASAVNIÐ**

**6** **TJÓÐBÓKASAVN**
7 FØROYADEILD
9 HANDRIT
12 SMÁPRENT
14 TILBÚGVING

**15** **TJÓÐBÓKADEILD**

**16** **MIÐLING**

**20** **ÚTLÁNIÐ**

**26** **HØVUÐSBÓKASAVN**
27 BÓKASAVNSKERVI
30 FØROYSKU BÓKASØVNINI
34 STOVNSTÆNASTA
35 INNKEYPSDEILDIN
35 VERKSTAÐURIN
35 BÓKASAVNSGJALD

**36** **UNIVERSITETSBÓKASAVN**

**40** **LJÓÐBÓKATÆNASTAN**

# INNGANGUR

***Yvirlýsingin fyri fólkabókasøvn frá 1949 er ein staðfesting av týdninginum, bókasøvnini hava til frama fyri frið og útbúgving til alla mannaættina.***

Í bókasavnslógini er ásett, at øll bókasøvn í Føroyum skulu veita fría og ókeypis atgongd til upplýsing, lærdóm og mentan. Bókasøvnini skulu stimbra fólkaræðisliga rættin at taka lut í samfelagnum og at mennast, hugsa, tosa og skriva frítt, eins og tey skulu tryggja mentanararvin, ið bókasøvnini varða av.

Heimsstøðan tykist at hava við sær, at vælferðartænastur og rættindi hjá fólki, verða alsamt meiri hótt tey næstu árini.

Bókasøvn og mentanararvur verða hótt í kríggi, og teirra leiklutur sum mentanarberi av máli, bókmentum og skaldskapi er avgerandi fyri trygdina og mótstøðuføri í samfeløgum.

Vit hoyra ferð eftir ferð, at mentanararvur verður forkomin í krígsherjaðum londum, tí mentanararvur er samleikaskapandi og partur av tí, sum bindur okkum saman sum fólk. Verða minnini um at vera eitt fólk viskað burtur, er lættari at niðurbróta eina tjóð. Tann, ið hevur tamarhald á vitanini hevur maktina.

Í Bibliotekens roll i det civila försvaret bindur Anna McWilliams bókasøvnini og íbúgvar saman sum ein part av almannaverndini. Í truplum tíðum, tá virksemið verður skert, verða bókasøvnini staðið, har fólk leita sær at fáa hjálp. Tað er av alstórum týdningi, at bókasøvnini halda áfram við sínum vanliga virki at læna út bókmentir. Tað, at tryggja atgeingi til álítandi keldur og bókmentir, er í roynd og veru tað, sum er við til at gera fólk før fyri at síggja heimin úr sjónarhorninum hjá øðrum.

Við hesum í huga, er tað av alstórum týdningi, at vit tryggja mentanararvin, og at vit vita, hvussu vit skulu handfara truplar støður.

**Annika Smith**
Landsbókavørður

# UM LANDSBÓKASAVNIÐ

***Eftir lógini er Landsbókasavnið Tjóðbókasavn, Universitetsbókasavn, Vísindabókasavn og Høvuðsbókasavn.***

## ENDAMÁL SAVNSINS ER

- at savna allar føroyskar bókmentir og so mikið sum gjørligt av bókmentum um Føroyar
- at taka ímóti skylduavhendingini av útgivnum føroyskum verkum
- at skráseta, varðveita og fremja útbreiðslu av kunnleika um hetta og annað tilfar
- at skipa fyri skráseting av føroysku tjóðbókaskránni
- at hava handritadeild
- at menna og veita universitetsbókasavns-tænastur. ið stuðla undir gransking og undirvísing á hægri útbúgvingarstovnum.
- at vera føroysk ISBN/ISSN skrivstova í sambandi við altjóða skráseting av bókum og tíðarritum.
- at veita vísindabókasavnstænastu
- at samskipa keyp av bókasavnstilfari og tænastumenning á fólkabókasøvnunum

## STARVSFÓLK

| | |
|---|---|
| **Annika Smith** | Landsbókavørður |
| **Laura Vinther** | Varaleiðari / Miðling |
| **Høgni Bech** | Bókavørður / Tjóðbókadeild |
| **Øydis Bjerre** | Bókavørður / Skylduavhending |
| **Rikke Borgaard** | Bókavørður / KT |
| **Jóel Bringsberg** | Leiðari fyri Innkeypsdeildina |
| **Heiðrún H. Guðmundsdóttir** | Bókavørður / Handrit |
| **Herluf Hansen** | Setursbókavørður (settur á Fróðskaparsetrinum) |
| **Jonna Hansen** | Avgreiðslusamskipari |
| **Elin B. Heinesen** | Ljóðbókatænastan |
| **Sólvør Henriksen** | Bókavørður / Føroyadeild |
| **Svend Højgaard** | Universitetsbókavørður |
| **Alis Joensen** | Bókasavnshjálpari / Bókasavnsgjald |
| **Pipaluk Joensen** | Bókhaldari |
| **Sóleyg Kjærbæk** | Bókabindari |
| **Tanya Møller** | Bókavørður / Bókasavnskervi |
| **Tórunn H. Olsen** | Bókasavnshjálpari / Verkstaður |
| **Barbara Reynheim Petersen** | Bókasavnshjálpari |
| **Nansý Sunadóttir** | Bókavørður / Tónleikur |

# TJÓÐBÓKASAVN

# FØROYADEILD

***Høvuðsuppgávan hjá Føroyadeildini er at savna, skráseta og varðveita verk og tilfar, ið verður givið út á føroyskum, ið vendir sær til fólk í Føroyum, ella er eftir føroyskar høvundar. Endamálið við hesi uppgávu er at varðveita ein týðandi part av føroyska mentanararvinum til komandi tíðir.***

Í flestu førum ber til at hyggja at tilfarinum á bókasavninum, eisini kallað lesistovulán. Fyri árið 2025 eru tald 210 lesistovulán úr Føroyadeildini. Tá er talan er um útfyltar lániseðlar úr Føroyadeildini og ikki fyri eindir. Eitt nú kann eitt lesistovulán í hesum føri vera fyri fleiri árgangir av tíðarriti, fleiri fløgur, fleiri mappur av smáprenti o.s.fr. Hetta er ein øking síðani 2024.

*Lesistovulán úr Handrita -og Føroyadeildini seinastu árini*






Í heyst var framsýningin “Mentanararvur á bókasavninum - eitt innlit í føroyska samfelagið gjøgnum tíðina” frammi í durinum á Landsbókasavninum, har vit vístu fram tilfar úr Føroyadeildini. Endamálið við framsýningini var at vísa á eina av kjarnuppgávunum hjá Landsbókasavninum  - at varðveita partar av mentanararvinum, og at vísa hvussu føroyska samfelagið er broytt gjøgnum tíðina. Eitt innslag um framsýningina var í Degi og Viku 30. september, har víst var á týdningin av mentanararvi, og tær avbjóðingar, ið eru, í samband við innheintan og varðveiting av talgildum tilfari, m.a. sosialum miðlum. Eftir sendingina løgdu vit merki til, at tað millum fólk er áhugi fyri arbeiðnum at varðveita mentanararvin, og hava vit fingið fleiri fyrispurningar um skylduavhending og innheintan av tí talgilda, enn áðrenn. Skúlaflokkar vóru eisini og vitjaðu framsýningina, har vit greiddu frá tilfarinum og okkara arbeiði við mentanararvi.

Gjøgnum árini móttekur bókasavnið bøkur og annað tilfar. Í 2025 hava vit skrásett, at 15 privatfólk og stovnar, hava latið bókasavninum tilfar. Í hesum førum eru handritasøvn ikki tald við, men er talan um bókagávur, plakatir og líknandi tilfar. Vit takka fyri gávurnar, ið eru við til at stuðla arbeiðinum við at fullfíggja bókastovnin. Tað tilfar, ið viðvíkur Føroyum, men sum vit enn ikki hava í savninum, kalla vit desiderata. Til ber at leita fram yvirlitið yvir desiderata við at fara inn á leitisíðuna www.bokasavn.fo og skriva desiderata í leititeigin. Er okkurt á yvirlitinum, ið fólk ella stovnar ynskja at lata okkum, eru tey altíð vælkomin at seta seg í samband við okkum.

Arbeiðið við innheintan og varðveiting av talgildum tilfari heldur áfram, og er tað líkt til, at tað eisini kann samantvinnast við arbeiðinum við at vinna føroyskum vitlíki frama, ið sjálvandi er gleðiligt og áhugavert fyri okkum at arbeiða við.

# HANDRIT

***Høvuðsuppgávan á Handritadeildini er at standa fyri innsavning, varðveiting, skráseting og gransking av føroyskum handritum og skjølum, sum ikki hoyra til lógarbundnar avhendingar til Tjóðskjalasavnið. Starvsfólk skráseta handrit og privatskjalasøvn, taka sær av at tæna savnsgestum, sum leita eftir tilfari úr handritasavninum, umframt at veita kunningartænastu, arbeiða við framsýningum og øðrum fyrifallandi arbeiði.***

## NÝÚTVEGAN

Skrásettar vóru 8 nýggjar avhendingar í 2025.

Millum avhendingar vóru privatskjøl eftir Steinbjørn B. Jacobsen; Poul E. Petersen og Elinborg Petersen; Rólv Djurhuus; Turið Sigurðardóttir; Petur Andreassen og Petru Djurhuus.

## SKRÁSETING

*Skráseting í Handritadeildini kann deilast í tvey:*

**1. Skráseting úr verandi skjalatilfeingi. Handrit og privatskjøl**

Áhaldandi verður arbeitt við at gera skrá yvir handritasavnið. Samstundis var innpakking av nøkrum søvnum skift, so sum hjá Karen Sand, Poul Müller (1862-1901), Heðini Brú, Preben Hansen (lækni í Hellerup), Christine Sørensen (f. Thorndahl), Ungu Føroyar (blaðútgáva), Sámal á Krákusteini (1851-1932), Zakarias Wang (1940-2025).

**2. Nýskráseting av handritum og privatskjølum**

**Handrit:** Tey handrit, sum komu í savnið í árinum, vóru skrásett í óprentaða handritaskrá og í bokasavn.fo

**Privatskjøl:** Tey privatskjalasøvn, sum komu í árinum, hava fingið fyribilsskráseting, umframt at nøkur hava fingið gjølligari skráseting í bokasavn.fo.

## TALGILDING AV HANDRITUM

**Savnshjálparin á Handritadeildini, Sigmund Zachariassen, hevur skannað umleið 40 handrit og handritaeskjur til varðveitslu í 2025:**

Kvæðahandrit og tekstir eftir Jóan Petur uppi í Trøð **(P XV),** kvæðahandrit eftir Hans Olaus Jacobsen (I), rithøvundahandrit og dagbøkur **(G)**, Kvæðið um Gunnar á Lidarenda **(E 832)**, fleiri handrit eftir Claus Lund **(E 741, E 175, E 92, E 91)**, føroyskar vísur og kvæði sum Poul Müller átti **(E 729)**, kvæða- og sagnauppskriftir sum Símun av Skarði átti **(E 558)**, Barnarímur eftir Hans A. Djurhuus **(E 558)**, handrit eftir Jørgen-Frantz Jakobsen **(E 540)**, handrit og kvæði sum Hans J. Joensen átti **(E 539)**, handrit eftir bakar Hansen (Georg Hansen) **(E 321)**, Fuglakvæði eftir Poul Nolsøe **(E 319)**, handritasavn hjá Simun Petur Zachariassen, kvæða- og vísubók, sum J. P. Albinus átti **(E 301)**, uppskrift av harmleikinum Elektra **(E 124)**, søvn hjá Jens Davidson **(E 108, E 11)**, vísuuppskriftir eftir Hans Petur Hansen **(E 90)**, skaldakappingin 1930 **(E 89)**, yrkingar eftir Kvívíkar-Jógvan **(E 86)**, kvæði og handrit, sum Niels Winther átti **(E 83, E 44)**, kvæðahandrit og skjøl sum Antonius Hansen savnaði **(E81)**, kvæðabók hjá Niels Peter Lund **(E 71)**, sjónleikurin Flokksmennirnir **(E 45)**,skjøl o.a. eftir J. H. Schrøter **(E 21, E 14)**, vísuuppskriftir eftir Símun Simonsen **(E 19)**, innsavning fyri suðurjútsk børn í 1919 **(E 18)**, uppskriftir úr stovuni í Skálavík **(E 13)**, skjøl hjá Karl Danielsen **(E 6)**, vísuppskriftir sum Elsebeth Maria Veihe átti (E 4), nótar og sangir til gullbrúdleyp **(D VIII)**, Nólsoyar bók **(B IX)**.

## SANDOYARBÓK OG HENTZASAVN, ENDURNÝGGJAÐ LANGTÍÐARLÁN

***Tann 19. august 2025 komu kvæða- og vísuhandritini Sandoyarbók og Hentzasavn (Færøiske Qvæde) aftur til Landsbókasavnið. Tey vóru avhendað av Birgit Vinther Hansen, konservator á Kongaliga bókasavninum í Keypmannahavn, har tey vóru til eftirlit.***

Landsbókasavnið hevur havt bæði handritini til láns og varðveitslu í meir enn 30 ár. Í hesum tíðarskeiði hava handritini regluliga verið til eftirlit hjá savnsvørðum á Kongaliga bókasavninum.

Søgan byrjaði við, at Landsstýrið setti eina nevnd í 1987 at virka fyri, at handrit og skjøl av føroyskum uppruna, ella handrit og skjøl, sum høvdu stóran mentanarligan týdning, vórðu flutt til Føroya. Eftirfylgjandi var framsýning hildin í Norðurlandahúsinum í 1990 við skjølum og handritum úr Svøríki, Danmark og Føroyum. Her vóru hesi bæði handritini sýnd fram.

Til hetta høvið handaði svenski mentamálaráðharrin Føroya landsstýri Kongsbókina (skinnhandrit úr miðøld, sum inniheldur Seyðabrævið og Hundabrævið), sum nú verður varðveitt á Tjóðskjalasavninum.

Fýra ár seinni, í 1994, fekk Landsbókasavnið Sandoyarbók og Hentzasavn, aftur til Føroya til langtíðarláns. Hetta var í sambandi við, at tá vóru 200 ár liðin, síðani kvæðasavnarin Jóannes í Króki –skrivaði upp kvæðini í báðum hesum handritunum í tíðarskeiðinum 1817-1831. Kvæðahandritini vórðu avhendað á almennum hátíðarhaldi á Føroya landsbókasavni, 26. november 1994.

Sandoyarbók **(DFS 1883/068)** hoyrir til savnið hjá Svend Grundtvig, professara (1824-1883), sum Kongaliga bókasavnið fekk til varðveitslu frá Dansk Folkemindesamling. Grundtvig keypti handritið frá arvingum Jóannesar í Króki.

Hentzasavn **(NKS 1954 kvart)** inniheldur tey kvæðini og vísurnar, Jóannes varð biðin um at skriva upp av amtsprósti Peter Matthiesen Hentze (1753-1843), tá ið Peter Erasmus Müller (1776-1834) heitti á fleiri kvæðainnsavnarar í Føroyum at fara undir at innsavna kvæði og senda uppskrivingarnar til Keypmannahavnar. Hetta aftan á, at H. C. Lyngby hevði verið í Føroyum í 1817.




Poems
Edge
Extinction

# SMÁPRENT

***Smáprent er nógv ymiskt kunnandi tilfar, ið ikki regluliga verður útgivið, og sum hevur fáar síður. Smáprent kann vera t.d. faldarar, postkort og gravsálmar.***

Smáprent er týdningarmikið at savna inn og varðveita fyri eftirtíðina, tí tað er við til at siga nakað um føroyska samfelagið, søgu og mentan. Í fleiri ár hava vit sæð eina gongd í, at vit ikki fáa eins nógv prentað smáprent longur, sum vit fingu fyrr. Ein av orsøkunum til tað er, at alt meiri tilfar bert kemur út talgilt. Talgilt smáprent verður tó eisini innheintað og varðveitt.

Í ár valdi Landsbókasavnið at gera eina stóra framsýning við tilfari, ið lýsti ein part av føroyska mentanararvinum, sum Landsbókasavnið varðveitir. Nógv ymisk sløg av smáprenti vóru við í framsýningini, so á tann hátt bleiv nógv ljós varpað á smáprent í ár.





NGIN
14 kr.
Serlig grannskoð-
an fyritreyt fyri
dómarakanning!
IAI KL. 19 30
ia bandinum/fløguni
d. 11 bólkar luttal
UR AFT
ARIA
HJAR
Konsert og dans
Bert ko
ARBEIÐSGEVARARNIR RÍKA SEG UPP,
AV OKKARA ARBEIÐI
Framhald á bls. 11
Vi
bróstm
Danmark
er seinasta lokabragd sambandsins
Frælsisfylkingin er
tryggasti skansin
VELJIÐ FRÆLSISFYLKINGINA
LISTA J 7. JULI
K og
ardamun
HORBJØ
LEIKSTJÓR
PELL
Høydølur
Sólrún
Michelsen
tema við

# TILBÚGVING

***Nú heimsstøðan er broytt, er ein tilbúgvingarbólkur settur at taka sær av at fyrireika tilbúgving til at bjarga mentanararvinum í truplum tíðum.***

Í Føroysku UNESCO-nevndini, har Landsbókasavnið hevur umboð, hevur tilbúgving og verja av mentanararvi fylt nógv. Eitt nú hevur UNESCO-sáttmálin um verju av mentanarvirðum í krígsstøðu frá 1954, sum Føroyar hava tikið undir við, verið umrøddur.

Flestu lond í heiminum bundu seg í Haag-sáttmálanum frá 1954 til at verja mentanarvirðir bæði innan fyri egin landamørk og uttanlands í samband við vápnað stríð. Kortini síggja vit framvegis dømi um, at statir tilvitað leypa á mentanararv hjá øðrum londum fyri at veikja tey og endurskriva søguligar frásagnir.

Norðurlendsku og baltisku londini eru byrjað at styrkja sína tilbúgving í samband við, at støðan í heiminum í dag er merkt av ófriði. Í desembermánaða vórðu tvey umboð úr Føroyum boðin við á ”Hanaholmen Heritage Training Program”.

Undir formansskapinum hjá Svøríki í Norðurlendska ráðharraráðnum var tilbúgving fyri mentan eitt týðandi raðfestingarøki, og tann 3. mai 2024 samtyktu norðurlendsku og baltisku mentamálaráðharrarnir eina yvirlýsing um verju av mentan og mentanararvi í krepputíðum. Fyrireiking innan mentanararv hevur eisini verið eitt høvuðsøki undir felags formansskapinum hjá Finnlandi og Álandi í 2025, og arbeiðið heldur fram undir danska formansskapinum í 2026. Skráin hjá Hanaholmen um fyrireiking innan mentanararv byggir á hetta arbeiðið og setur, við stuðli frá Norðurlendska ráðharraráðnum, í gongd eina royndaskipan við at deila royndir millum lyklapersónar í norðurlendska og baltiska økinum.

*Tvey umboð eru úr Danmark, Estlandi, Føroyum, Finlandi, Íslandi, Letlandi, Litava, Noregi, Svøríki og Álandi.*

*Guðrið Poulsen, Tjóðsavnið og Annika Smith, Landsbókasavnið umboða Føroyar, sum m.a. umfatar eitt skeið í tríggjar dagar á Hanaholmen í Finlandi í mai mánaða 2026.*

# TJÓÐBÓKADEILD

***Tjóðbókadeildin skrásetir upprunaføroyskar útgávur og verk, ið eru týdd til føroyskt. Útgávurnar verða skrásettar í tjóðbókalistan, og hvørt ár verða tølini send Hagstovuni, ið leggur tey á heimasíðu sína.***

Í 2025 komu 24 upprunaføroyskar fagur bókmentir til vaksin út. Býtið av føgru bókmentum á upprunaføroyskum sá soleiðis út í ár: 12 yrkingasøvn, 6 stuttsøgusøvn og 6 skaldsøgur.

79 upprunaføroyskar yrkisbókmentir komu út í ár.

Á Tjóðbókadeildini verða føroyskir høvundar eisini skrásettir í okkara grunni við føði- og deyðadagfesting. Eisini verða føroysk evnisorð skrásett, soleiðis at okkara bókasavnsskipan kann miðla tilfarið á føroyskum máli.

Á Tjóðbókadeildini er ISBN/ISSN skrivstova, sum hevur til arbeiðis at skráseta føroysk forløg hjá altjóða ISBN-skrivstovuni, International ISBN Agency, og at veita forløgum ISBN (skrásetingarnummar til bøkur). ISBN er stytting fyri International Standard Book Number. ISSN er skrásetingarnummar til tíðarrit og er stytting fyri International Standard Series Number. Hetta verður umsitið av donsku ISSN-skrivstovuni á Kongaliga bókasavninum í Keypmannahavn.

# MIÐLING

## FRAMSÝNINGAR

***Í 2025 hava tvær stórar framsýningar og fleiri smáar verið. Tær stóru framsýningarnar vóru Í Hesti og Mentanararvur á bókasavninum.***

### Í Hesti – fotoframsýning hjá Randi Ward við myndaevnum úr Hesti.

Í mars 2009 flutti amerikanski rithøvundurin og fotografurin Randi Ward út í Hest og búði har seinastu seks mánaðirnar, ið hon dvøldi í Føroyum. Svart-hvítu fotomyndirnar í framsýningini í Hesti vórðu tiknar í hesum tíðarskeiðinum. Tær mæla ímóti teirri romantisku umrøðuni, sum fjølmiðlar og ferðavinna alt ov ofta nýta, tá ið tey skulu lýsa Føroyar og føroysku bygdirnar, t.e. sum æventýrakend støð, har tíðin stendur í stað.

Randi Ward er rithøvundur, týðari og fotografur úr West Virginia í USA. Randi hevur vunnið virðislønir, bæði fyri týðingar av norðurlendskum skaldskapi til enskt mál og fyri sínar fotomyndir. Í 2024 fekk Randi Ward Heiðursgávu landsins fyri sítt áhaldandi arbeiði og stóra hegni at týða og gera vart við føroyskan skaldskap úti í heimi.

Sum týðari hevur Randi Ward havt nógv at siga fyri føroyskar høvundar, og til mentanarnáttina valdu vit at víðka um framsýningina og vísa nakrar av hennara týðingum umframt egið ritverk.

Framsýningin var frá 26. januar til 26. august 2025 í forhøllini á Landsbókasavninum.



## William Heinesen 125 ár

15. januar 1900 varð William Heinesen borin í heim. Tann fyrsti av trimum av okkara fremstu høvundum, sum vórðu føddir í 1900. Í sambandi við føðingardagin valdu vit at hava eina lítla minnisframsýning. William andaðist 12. mars 1991, 91 ára gamal.

Størsti parturin av handritunum eftir William Heinesen eru varðveitt á Kongaliga bókasavninum í Keypmannahavn. Tó eru vit so heppin at hava handritið til óútgivnu skaldsøguna Den yderste tid í varðveitslu. Eitt sera áhugavert og virðismikið handrit. Handritið var í privatari ogn hjá einum bókasavnara í nógv ár, men í januar 2016 lat Mentamálaráðið Landsbókasavninum handritið í gávu. Hetta eru vit sjálvandi ómetaliga glað um. Á sjálvum føðingardegnum valdu vit at vísa sjálvt handritið, meðan eitt avrit av tí lá frammi alla framsýningina.

Umframt handritið, var annað forvitnisligt at síggja, t.d. tónlistarverkið Listaskálakantatan og "blaðið" Aand og Lys.

Framsýningin stóð frá 13. januar 2025 og mánaðin út.

## Mentanararvur á bókasavninum – eitt innlit í føroyska samfelagið gjøgnum tíðina

Endamálið við framsýningini var at vísa eina av kjarnuuppgávunum hjá Landsbókasavninum - at varðveita partar av mentanararvinum – og at vísa, hvussu føroyska samfelagið er broytt gjøgnum tíðina. Umframt tilfarið, ið er víst fram, varðveitir bókasavnið eisini handrit og útlendskar útgávur um Føroyar. Nógv av hesum tilfari er komið inn umvegis skylduavhending, men okkurt er blivið savnað inn av bókasavninum sjálvum. Í framsýningini er dentur lagdur á føroyskt tilfar, ið er 75 ár og yngri.

Framsýningin var frá 16. september 2025 til 16. januar 2026 í forhøllini á Landsbókasavninum.



## SMÆRRI FRAMSÝNINGAR

***Eisini hava fleiri smærri framsýningar verið í 2025. Vit taka nakrar teirra fram her.***

### Føroysk frímerki 50 ár

30. januar 1975 komu fyrstu føroysku frímerkini, og í sambandi við 50 ára dagin gjørdu vit eina framsýning um frímerki. 14 frímerki vórðu útgivin í 1975, og trý frímerki komu afturat 1. apríl 1976, tá eitt sjálvstøðugt føroyskt postverk varð stovnsett. Øll tey fyrstu frímerkini kundu síggjast í framsýningini.

Við skylduavhending fær Landsbókasavnið øll frímerki, faldarar, brævbjálvar og annað, ið Posta (Postverk Føroya) gevur út. Í goymsluni á Landsbókasavninum eru tí øll frímerki varðveitt, ið eru givin út seinastu 50 árini.

Framsýningin vísti bert ein lítlan, útvaldan part av øllum frímerkjunum, sum eru í goymsluni á bókasavninum. Tvey frímerki, ið bókasavnið valdi at taka fram, vóru frímerkini, ið vórðu gjørd í sambandi við, at Landsbókasavnið bleiv 150 ár í 1978. Frímerkið, ið avmyndar gamla bókasavnið, sum Flora Heilmann hevur teknað, vann heiðurin sum vakrasta frímerki í Evropa í 1978.

Framsýningin stóð frammi eina viku, til 7. februar.

### Føroysk bókasnið

Bøkur eru meira og annað enn tað tekstliga innihaldið.

Framsýningin Føroysk bókasnið var ein heldur øðrvísi bókaframsýning, har denturin varð lagdur á bókasniðini. Í framsýningini vóru eitt úrval av nýggjari føroyskum bókum. Dentur varð lagdur á bøkur, har snið, litir, tilfar, myndir og stødd vóru sermerkt.

Í eini tíð har talgildar bøkur vinna fram, var hetta eitt gott høvi at lata hugin reika og hugsa um hvørjar ítøkiligar eginleikar ein pappírsbók hevur, og hvussu hon kann ávirka teg.

Framsýningin var gjørd í samstarvi við nýggja altjóða føroyska bókmentafestivalin, sum var hildin í Føroyum frá 26. februar til 1. mars 2025.

Framsýningin stóð frammi frá 26. februar til 7. mars.




### #BannaðarBøkur

Síðan 1982 hevur Banned Books Week verið í USA hvørt ár í septembermánaða. Í Norra, Svøríki og Danmark er vikan løgd 5. til 12. oktober, og her eru tað PEN felagsskapirnir, sum eru stigtakarar til átakið #BannaðarBøkur. Eisini í Grønlandi og Føroyum eru bókasøvn partur av átakinum.

Við átakinum verður sjóneyka sett á sensur og talu -og skrivifrælsi.

Bøkurnar, ið vit valdu at vísa fram, vóru eitt úrval av listanum av bannaðum bókum hjá Dansk PEN. Allar bøkurnar á listanum eru ella hava verið bannaðar ella sensureraðar onkrastaðni í heiminum, tær vóru valdar út soleiðis, at tær




fevndu um so nógv av heiminum sum møguligt. Umframt eru grundgevingar til forboðini ymiskar, tær kunnu eitt nú snúgva seg um átrúnað, kyn, rasu, samleika, politikk ella talu -og skrivifrælsi.

Í Føroyum eru vit ikki von at banna bøkur, men vit hava fleiri ferðir upplivað at bøkur, bæði týddar og upprunaføroyskar elva til stórt kjak í føroyska samfelagnum. Eisini her hjá okkum hava orsøkirnar verið ymiskar, tær fevna eitt nú um átrúnað, rasu, kyn og samleika. Vit valdu at taka fýra ymiskar bøkur á føroyskum við í framsýningina, sum kjakast hevur verið um, bæði á netinum, í lesarabrøvum og á tingsins røðarapalli.

Framsýningin stóð frammi frá 7. til 17. Oktober.

## Jørgen-Frantz Jacobsen 125 ár

29. november 2025 vóru tað 125 ár síðani, Jørgen-Frantz Jacobsen varð borin í heim. Jørgen-Frantz er mest kendur fyri skaldsøguna Barbara, ið kom út í 1939 eitt ár eftir deyða hansara. Chr. Matras føroyskaði bókina í 1972 við heitinum Barba og harra Pál.

Sum heilt ungur fór Jørgen-Frantz til Danmarkar at ganga í skúla. Men longu tá hann var fyrst í 20'inum, varð hann raktur av tuberklum og stríddist við sjúkuna fram til 24. mars 1938, tá hann andaðist bert 37 ára gamal.

Landsbókasavnið hevur upprunahandritið til skaldsøguna Barbara. Mánadagin 1. desember


Mín
jólabók
2025
75 ár
mín JØLABÓK

valdu vit at vísa sjálvt handritið til Barbaru, meðan eitt avrit av tí lá frammi alla framsýningina. Umframt handritið var annað forvitnisligt at síggja t.d. eitt úrval av brøvum hansara til mammuna. Sum barn gjørdi hann eisini tvær hondskrivaðar bøkur til hana, ið vit vístu fram.

Framsýningin stóð frammi frá 1. til 12. desember.

## Mín Jólabók 75 ár

Á vetri 1950 kom fyrsta útgáva av Míni jólabók. Tað vil siga, at í 75 ár hevur Mín jólabók ríkað okkara desembermánaða við hugnaligum søgum, yrkingum og seinni árini eisini ítrivum, at stytta okkum stundir við, meðan vit bíða. Bara tað árið, tá glæstribøkurnar komu út í 1958, varð Mín jólabók ikki givin út. Bókadeild Føroya Lærarafelags fekk í 2023 Barnamentanarheiðursløn Tórshavnar býráðs fyri Mína jólabók.

Í sambandi við stóra føðingardagin savnaðu vit allar 74 útgávurnar av Míni jólabók. Við hesum 74 bókunum á einum og sama stað sást, hvussu Mín jólabók er broytt gjøgnum árini. Serliga týðilig er broytingin í 2004, tá bókin varð broytt til eina kalendarabók í 24 pørtum.

Umframt at vísa okkara útlánseintøk, vóru vit eisini í goymsluni og funnið eitt úrval av Míni jólabók, ið hvørki vóru innbundnar ella plastaðar. Øll árini hevur siður verið at bæði okkara viðurkendu rithøvundar og myndlistafólk og rithøvunda- og listaspírar lata tilfar til jólabókina. Til framsýningina valdu vit nakrar av mongu vøkru permunum á Míni jólabók og gjørdu tær til plakatir í A3 støddum. Millum tær valdu var eitt nú perman, sum Elinborg Lützen gjørdi til Mína jólabók 1960 og perman, sum Beinta Johannesen gjørdi í 1987 einans 13 ára gomul.

Við framsýningini ynsktu vit Bókadeildini og Míni jólabók hjartaliga til lukku!

Framsýningin stóð frammi allan desember.

## Chr. Matras 125 ár

Christian Matras er seinastur av okkara trimum stóru høvundum, sum vórðu føddir í 1900. Hann varð borin í heim á Viðareiði 7. desember. Christian var sera virkin bæði sum yrkjari, týðari og málfrøðingur. Hann andaðist 16. oktober 1988.

Í 1928 tók Christian magistaraprógv í norrønari málfrøði, og í 1933 vardi hann doktararitgerð sína um staðanøvn í Norðuroyggjum. Hann gjørdist lektari við lærda háskúlan í Keypmannahavn, og í 1952 bleiv hann tilnevndur professari. Í hesum tíðarskeiði bygdi hann upp stóra orðaseðlasavnið, ið er grundarlagið undir føroyskum orðabókaarbeiði. Í 1965 bleiv Chr. Matras leiðari á Føroyamálsdeildini á Fróðskaparsetrinum og røkti starvið til 1971, tá hann legði frá sær.

Fyrsta yrkingasavn hansara var "Grátt, kátt og hátt" (1926). Umframt at yrkja sjálvur, týddi hann nógvar bókmentir til føroyskt. Her í millum eisini bókmentir hjá javnaldrunum William Heinesen og Jørgen-Frantz Jacobsen.

Vit valdu at sýna fram útvaldar týðingar, yrkingasøvn og vísindaligar útgávur eftir Chr. Matras.

Framsýningin stóð frammi 8. til 19. desember.

## Vika 17

Í viku 17 varpa føroysku bókasøvnini ljós á tey 17 heimsmálini hjá ST fyri burðardyggari menning.

Í hesum sambandi skipaðu vit fyri einum ókeypis urtapottamarknaði á Landsbókasavninum. Við plantumarknaðinum vildu vit eggja til hugburð um at endurnýta og deilast um tilfeingi og vísa á, at plantur hava góða og avgerðandi ávirkan á okkara lív.

# ÚTLÁNIÐ

*Samlaða talið av vitjandi á Landsbókasavninum í 2025 var 13.389, sum er ein lækkan samanborið við í fjør, tá talið av vitjandi var 14.762*




*Samlaða talið av fyrispurningum hækkaði í 2025 til 4.720 samanborið við í fjør, tá samlaða talið av fyrispurningum var 4.342.*




| | Januar | Februar | Mars | Apríl | Mai | Juni | Juli | August | September | Oktober | November | Desember |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2024 | 180 | 177 | 329 | 464 | 502 | 374 | 163 | 304 | 420 | 470 | 529 | 430 |
| 2025 | 419 | 444 | 472 | 349 | 446 | 275 | 186 | 267 | 455 | 469 | 456 | 482 |

*Niðanfyri sæst talið av fyrispurningum býtt sundur í telefonsamrøður, teldupostsamskifti og andlit til andlits fyrispurningar við bókavarðaborðið og í avgreiðsluni.*






*Samlaða útlánið er støðugt. Útlánstalið í 2025 var 10.856 lán samanborið við 10.886 í 2024. Útlánstølini fevna bæði um fysisk lán og lán á eReolen og Filmstriben.*




*Á Landsbókasavninum verður eisini bílagt tilfar frá donskum bókasøvnum, og í 2025 lá talið á 232. Donsk bókasøvn bíleggja eisini tilfar av Landsbókasavninum, og í 2025 var tað talið 53, sum er ein hækkan samanborið við í fjør, tá talið var 8. Postgjaldið er dýrt, og tí er fjarlán ein avmarkaður møguleiki.*

# HØVUÐSBÓKASAVN

***Sum høvuðsbókasavn fyri alt landið veitir Landsbókasavnið bókasavnstænastur til øll onnur bókasøvn í landinum. Landsbókasavnið hevur umsjón við fólkabókasøvnunum og veitir ráð og leiðbeining.***

# BÓKASAVNSKERVI

***Sambært Bókasavnslógini um bókasavnskervi og bókasavnssamstarv skulu bókasøvnini taka lut í samstarvi sínámillum.***

Bókasøvnini skulu vera partur av bókasavnsskipan, ið Landsbókasavnið hevur góðkent og vera partur av felags lánisamstarvi millum bókasøvn, bæði innan og uttanlands.

Bókasavnsskipanirnar eru týðandi partur av hesum samstarvi á bókasøvnunum kring landið. Tær stýra bókasavnsrakstrinum til útlán, leiting, skráseting av lánarum og av tilfari, bílegging, endurnýggjan, áminningar og innkrevjing. Tvær bókasavnsskipanir eru í landinum, tær eru Reindex og Cicero.

Landið veitir stuðul til kommunurnar til menning av fólkabókasavnstænastum. Landsstýrisfólkið fráboðar kommununum í seinasta lagi 31. mars á hvørjum ári, hvussu ætlanin er at býta játtanina, ið eftir ætlan verður sett av til stuðulin fyri komandi árið.

Í ár varð stuðul á 2.844.000 kr. latin til menning av fólkabókasavnstænastum, til keyp av føroyskum bókum og talgildum tænastum og til skipan av samstarvi millum kommunur um fólkabókasavnstænastur.

Størsti parturin av stuðlinum, 2.010.000 kr. varð latin til tær kommunur, ið frammanundan hava starvsfólk við hægri bókasavnsfakligari útbúgving í starvi á fólkabókasavninum. Talan er um Tórshavnar kommunu, Klaksvíkar kommunu og Runavíkar kommunu, ið hava fingið ein triðing av upphæddini hvør, tvs. 670.000 kr. fyri at veita tænastur til tey minni bókasøvnini í landinum. Hesi bókasøvnini, Býarbókasavnið í Havn, Bókasavnið við Løkin og Klaksvíkar bókasavn verða nevnd Veitarabókasøvn.

Tað verða í mesta lagi 834.000 kr. settar av til keyp av føroyskum bókum og til at rinda fyri talgildar bókasavnstænastur í kommununum. Landsbókasavnið umsitur stuðulin til menning av fólkabókasavnstænastum og fráboðar kommunum, hvussu stuðulin verður býttur millum tær.

Kommunurnar gera avtalu sínámillum um fólkabókasavnstænastur. Avtalan fevnir fyrst og fremst um ráðgeving um fólkabókasavnsrakstur, har undir ráðgeving um bókasavnsskipanir, skráseting, innkeyp, kassatión, klassifikatión, leiting, meting av tilfari og keldum og miðlan av bókmentaligum tilfari.

# HAGTØL YVIR BÓKASØVNINI Í FØROYUM




*Útlánstalið fyri øll bókasøvnini í Føroyum var í 2025 192.914, sum er eitt fall frá í fjør. Við í tølunum eru útlánstølini á eReolen og Filmstriben. Samlaða útlánstalið fyri eReolen í ár er 21.363.*




*Eitt fall sæst eisini í bókastovninum yvir alt landið. Hesi tølini vísa, at bókastovnurin er livandi, at á bókasøvnunum kring landið verður ruddað út og keypt nýtt inn javnan.*

# FØROYSKU BÓKASØVNINI

***Í kjalarvørrinum av, at tað er staðfest við lóg, at føroyska bókasavnskervið skal samstarva, eru "Føroysku Bókasøvnini" sett á stovn í 2024. Hetta er eitt samstarv millum bókasøvnini, sum hevur til endamáls, at samskipa bókasavnstiltøk og at seta fólkabókasøvnini á breddan.***

Tað eru tey trý størstu fólkabókasøvnini í Føroyum, Býarbókasavnið í Havn, Bókasavnið við Løkin og Klaksvíkar bókasavn sum saman við Landsbókasavninum hava tikið stig til at menna hetta samstarv, soleiðis at øll bókasøvn í Føroyum kunnu standa sterkari í almenna rúminum.

Hesi trý fólkabókasøvnini hava í nógv ár verið tey einastu bókasøvnini við faklærdum bókavørðum í starvi og eru tí eisini vald út til at verða veitarabókasøvn fyri hini bókasøvnini.

## Lesaravirðislønin

Føroysku bókasøvnini settu í felag nýggja bókmentavirðisløn á stovn í 2024. Bókmentavirðislønin ber heitið Lesaravirðislønin hjá teimum føroysku bókasøvnunum, og tað eru lesararnir, ið gera av, hvør bók skal vinna ársins Lesaravirðisløn.

Virðislønin er sett á stovn til tess at seta sjóneyku á føroyskar bøkur, sum á hvørjum ári verða mest læntar og lisnar runt um á teimum føroysku bókasøvnunum, men eisini fyri at geva lesarunum eina rødd og høvi at virðisløna og fagna teimum bókunum, sum hava verið ársins mest læntu bøkur.

Virðislønin er serstøk á tann hátt, at tað eru lesararnir sjálvir, ið avgera, hvør skal hava virðislønina. Ein virðislønarnevnd, sum er mannað av starvsfólki frá føroyskum bókasøvnum, tilnevnir á hvørjum ári trý verk at atkvøða um. Tilnevningarnar byggja á útlánshagtøl hjá øllum føroysku fólkabókasøvnunum, umframt hagtøl hjá Landsbókasavninum

Virðislønin á 30.000 kr. varð fyrstu ferð latin á almennari móttøku á Klaksvíkar bókasavni. Ætlanin er, at handanin verður latin á veitarabókasøvnunum upp á skift.

Í ár varð Lesaravirðislønin handað á øðrum sinni, og hesa ferð varð hon handað Eyðuni Klakstein fyri bókina Lygn. Bøkurnar, ið vóru tilnevndar í 2025, vóru Lygn eftir Eyðuni Klakstein, Sára Malena eftir Sólrún Michelsen og Vilstar røtur eftir Ingun Christensen.

Handanin var á Bókasavninum við Løkin í Runavík, og Býarbókavørðurin í Klaksvík, Annika Egholm handaði virðislønina.

### Røðan hjá Anniku Egholm kann lesast her:

*Eg havi fingið tann heiður at handa lesaravirðislønina í ár. Hetta er á øðrum sinni at lesaravirðislønin verður latin.*

*Hendan virðislønin er ein møguleiki hjá bókasøvnunum at heiðra føroyskar bókmentir og teimum føroysku útgávum, sum eru best umtóktar millum bókasavnslánarar.*

*Tað eru lesararnir, sum avgera hvør fær heiðurslønina og seinasta mánaðin hava fólk kunnað atkvøtt millum tríggjar føroyskar bøkur, sum hava verið tilnevndar.*

*Vinnarin var avdúkaður 1. Mars, og er tað bókin Lygn hjá Eyðuni Klakstein, sum hevur vunnið Lesaravirðislønina.*

*Eyðun Klakstein er ein av okkara nýggju rithøvundum. Hann gav sína fyrstu skaldsøgu List út í 2021 og í 2023 kom Lygn. Bæði List og Lygn eru krimisøgur, og í báðum bókunum eru somu høvuðspersónar, gallaríeigarin Jón Amos og stjórin á listasavninum Sára Emmudóttir.*

*Í bókini Lygn ferðast søgan um tvey brotsverk, eitt, sum hendi fyri 20 árum síðani, tá ein ung genta, ið var vinkona Sáru, doyði eftir at hava tikið ekstrasy og í nútíðini, tá bróðir Sáru, Poli doyr eftir eina annars væleydnaða skurðviðgerð. Síðani verður fyrrverandi kona Jón Amos dripin og hann og Sára Emmudóttir royna at fáa greiðu á, hvat er hent.*

*Eyðkenni fyri nútíðar krimisøgur er ikki bert at viðgera morðið ella morðini og uppklára tey, men eisini at taka atlit til viðurskifti í samfelagnum og tey persónligu viðurskiftini hjá høvuðspersónunum.*

*Soleiðis er eisini í krimisøgunum hjá Eyðuni, vit hoyra t.d. um hvussu politikarar blanda*




*seg í smálutir, hvussu fjølmiðlanir arbeiða og hvat teir halda um miðlastuðulin, hvussu løgreglan arbeiðir, hvussu føroyingar hóreiggja sær á sosialu miðlunum, hvussu tað er at kenna seg sum ein mann í kvinnukroppi, um føroyska listaheimin - við øvund og klandri og um tað er munur at vera málari ella listamálari, hvussu støðan hjá teimum á niðastu rók er - teimum heimleysu, hvussu tað er at vera turrlagdur alkoholikari og hvussu tað er at vera avvarðandi til fólk við minnissjúku.*

*Eyðun er útbúgvin journalistur, og hann dugir væl við málinum, málið er lætt, og talumálið er gott, og hann hevur nógvar góðar samanberingar, og Jón Amos hevur mangar sera beinraknar, speiskar og skemtiligar viðmerkingar – sum t.d. tá Sára fær brævið aftaná, at beiggin er deyður í brævinum stendur "Hann gjørdi tað ikki", tá hugsar Jón Amos "fýra orð uttan stavivillur ella kommafeil – tað er yvir miðal í føroyskari rætt-skriving, í øllum førum samanborið við tey, sum brúka seg á Facebook". Ella tá hann hittir ein mann á eini barr, tá setur hann mannin inn í eina krossskipan har Barneby er x ásin og dansbands-tónleikur er y- ásin og maðurin er ein prikkur ovast í høgra horni.*

*Eitt evni, sum kanska verður viðgjørt meira enn onnur í bókini, er tónleikur, Jón Amos elskar tónleik - harðan metal tónleik og jazz, og vit hoyra*


FØROYSKU
BÓKASØVNINI






www.føroyarlesa.fo
DEKAMERON

*stutt brot um onkrar tónleikarar, so sum Miles Davis og Billie Holiday. Sjálvur sigur Jón Amos, at jazzur fyri hann er sum reyðmaðkurin – " fruktagóð jørð elskar reyðmaðkar, tí teir syrgja fyri at væta og luft seta niður í moldina og gera hana betri", so jazzur ger lívið betri.*

*Tað er ómetaliga týdningarmikið at hava bøkur á føroyskum, tí uttan føroyskar bøkur ber ikki til at lesa á føroyskum. Tá vit lesa føroyskar bøkur fáa vit innlit í føroyska samfelagið, og hvussu ymiskir vit føroyingar eru og hugsa.*

*Hjá krimilesarunum er tað eisini áhugavert at krimisøgurnar ganga fyri seg í Havn og Saksun, í staðin fyri Stockholm og Kiruna.*

*Vit sleppa heldur ikki at lesa tílíkar saman-beringar, ið vit lesa í Lygn í týddum bókum, sum hesar, tá Jón Amos skrollar á facebook og sær, at ein maður í Runavík bjóðar eina fløsku av Einars whisky í býti fyri ein glasfugl hjá Tróndi Paturssyni. Ella tá vit fáa at vita, at fyrr plagdi Feliks at vera tann, sum kom til tíðina, men hetta broyttist, tá hann hevði búð í Vestmanna í nøkur ár.*

*Góði Eyðun hjartaliga til lukku við Lesaravirðis lønini 2025, og eg vóni, tú heldur fram at skriva.*

## Bókadagar í Norðurlandahúsinum

Í samband við Bókadagar í Norðurlandahúsinum 15. november 2025 bjóðaðu Føroysku bóka-søvnini og Føroyar lesa til tiltak við yvirskriftini: skýming – samrøða – samljóð.

Tiltakið var ein samanrenning við norðurlendsku bókmentavikuna, har evnið var "Samanhald í Norðurlondum". Bøkurnar, ið vóru valdar fyri 2025 vóru Ein hundur, ein ketta og ein mús eftir Bárð Oskarsson og Andvake eftir Jon Fosse.

Tiltakið var í tveimum. Byrjað varð við bókini Ein hundur, ein ketta og ein mús eftir Bárð Oskarsson. Paula Gaard og Kinna Poulsen um-røddu skaldskapin og listina hjá Bárði.

Seinni partur var upplestur av bókini Andvake eftir Jon Fosse. Marna Jacobsen týddi brot av bókini til føroyskt í samband við norðurlendsku bókmentavikuna, og hon las upp fyri okkum. Knut-Øyvind Hagen, ið er norðmaður og starvast í Norðurlandahúsinum, las eitt brot á norskum.

Eitt væl vitjað tiltak í hugnaligu Dansistovuni, har sjóneykan varð sett á norðurlendskan skaldskap, list og samanhald.

### Koyriskipanin

Koyriskipanin er ein skipan, har lánarar kunnu bíleggja, heinta og lata bøkur inn á einum bókasavni í nærumhvørvinum.

Føroysku bókasøvnini fóru í 2025 undir eitt nýtt átak, nevniliga koyriskipanina. Endamálið við koyriskipanini er, at tað skal vera lætt hjá bókasøvnum at læna frá hvørjum øðrum, og á tann hátt bjóða lánarum eina góða tænastu. Við koyriskipanini kunnu lánarar heinta og lata bøkur inn á bókasøvn í nærumhvørvinum, hóast bøkurnar kanska hoyra heima á Landsbókasavninum.

Koyriskipanin riggar soleiðis, at vil ein lánari hjá Klaksvíkar bókasavnið læna eina bók, sum bert er á Býarbókasavninum í Havn, heintar koyriskipanin bókina og koyrir hana til Klaksvíkar, lánarin kann síðani heinta bókina og lata hana inn har, og bókin fer so aftur til Havnar við koyriskipanini.

Bilurin hjá Landsbókasavninum hevur eftir tørvi koyrt millum hesi bókasøvn hvønn mikudag í 2025: Landsbókasavnið  Býarbókasavnið  Bóka-savnið við Løkin  Sunda bókasavn  Fuglafjarðar bókasavn  Klaksvíkar bókasavn og sama veg heim aftur um neyðugt. Tilsamans koyrdu vit í 39 vikur í hesi 1 ára royndartíð, og í hesum tíðarskeiðinum vórðu 632 bøkur læntar millum bókasøvnini, tað er 16,21 bøkur pr. viku. Royndarskipanin var væl eydna og heldur tí áfram í 2026 eisini.

# STOVNSTÆNASTA

***Í 2025 varð ein arbeiðsbólkur settur mannaður av Eyðuni Jakobsen, fulltrúa í Undirvísingarstýrinum, Páll Isholm, miðnámsskúlalærara og samskipara og Tanyu Møller, bókavørði. Bólkurin byrjaði fyrireikandi arbeiði við tilmæli til eina nýggja kunngerð til miðnámsskúlarnar.***

Í "Løgtingslóg um bókasøvn" (bókasavnslógin) stendur í fjórða kapitli:

**Skúlabókasøvn**

§ 11. Skúlabókasøvn skulu vera í øllum skúlum.

Stk. 2. Skúlabókasøvn skulu bjóða fram bøkur og annað tilfar og menna førleikar hjá næmingum, ið stuðla undir lívlangari læring, og sum brynja næmingarnar til at handfara upplýsingar á øllum miðlum.

Stk. 3. Skúlabókasøvn kunnu verða skipað saman við einum fólkabókasavni ella einum skúlabókasavni í einum øðrum skúla.

Stk. 4. Landsbókasavnið vegleiðir um bókasavnsfakliga virksemið hjá skúlabókasøvnunum sambært §§ 11-14.

-------------------------------

**Fólkaskúlin**

§ 12. Skúlabókasøvnini í fólkaskúlanum eru skipað sambært løgtingslóg um fólkaskúlan.

--------------------------------

**Miðnámsskúlar og yrkisskúlar og onnur útbúgvingartilboð**

§ 13. Skúlabókasøvn skulu vera í øllum miðnámsskúlum og yrkisskúlum og øðrum skúlum, sum bjóða út útbúgvingar.

Stk. 2. Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um skúlabókasøvn, sum eru skipað sambært stk. 1.

--------------------------------

**Frískúlar, eftirskúlar, serskúlar, fólkaháskúlar og húsarhaldsskúlar**

§ 14. Skúlabókasøvn skulu vera í frískúlum, eftirskúlum, serskúlum, fólkaháskúlum og húsarhaldsskúlum, sum bjóða undirvísingartilboð við almennum stuðli.

Stk. 2. Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um skúlabókasøvn, sum eru skipað sambært stk. 1.

Brotið, ið snýr seg um miðnámsskúlar í Bókasavnslógini er ikki so umfevnandi, og av hesi orsøk fekk bólkurin til uppgávu at kanna bókasavnsviðurskiftini á skúlunum og at gera eitt uppskot um hvussu bókasøvnini kunnu betrast og og tryggja, at bókasøvnini á miðnámsskúlunum verða ein virkin og dagførdur partur av útbúgvingarskipanini, við bæði talgildum og fysiskum tilboðum, sum stuðla undir læring og fakliga menning.

Bókasavnið er eitt "verustað", sum bjóðar bæði næmingum og lærarum vælkomnum. Har skal vera pláss til at sita sjálvur og hugsavna seg, eisini skal vera pláss fyri bólkum til bólkaarbeiði og tað tilfarið, sum lánararnir hava tørv á skal vera atkomuligt, ella skal bókasavnið hava møguleika at kunnu skaffa tilfarið. Harafturat kemur, at mann hevur skikkað starvsfólk at taka sær av bókasavninum, sum syrgir fyri at tilfarssavnið er innbjóðandi og tíðarbært, og kann undirvísa næmingum í informatiónsleiting og keldukritikki, og sum kann skipa fyri tiltøkum og/ella gera framsýningar, ið geva íblástur til lesing.

Umstøðurnar, næmingargrundarlagið og tørvurin eru ymisk frá skúla til skúla og umráðandi er, at ein komandi reglugerð tekur atlit at hesum ymisleika. Tí var ætlanin at vitja skúlarnar, síggja umstøðurnar, hoyra um tørvin og framtíðarætlanir, so reglugerðin verður so beinrakin, hóskandi og framsíggin sum møguligt.

**Arbeiðsbólkurin valdi í fyrstu syftu at vitja hesar skúlarnar:**

- Glasir
- Klaksvíkar HF-skeið
- Miðnám á Kambsdali
- Miðnám í Vestmanna
- Miðnám í Suðuroy (Teams-fundur, tí bókasavnið verður umbygt.
- Tekniska skúla í Klaksvík

Eftir vitjanirnar verður eitt uppskot til reglugerð gjørt, sum verður sent til hoyringar og viðgjørt á einum felags hoyringsfundi, áðrenn reglugerðin verður sett í verk. Málið er at fáa eina reglugerð á økinum klára áðrenn summarfrítíðina 2026.

# INNKEYPSDEILDIN

***Innkeypsdeildin hevur til uppgávu at keypa bøkur, sum Føroyadeild og Útlánið á Landsbókasavninum biðja um, eisini skal Innkeypsdeildin á Landsbókasavninum samskipa keypið av bókum og øðrum tilfari til fólka- og skúlabókasøvnini kring landið og um tørvur er á tí eisini til onnur bókasøvn. Innkeypsdeildin ger bøkurnar klárar til verkstaðið at plasta. Bøkurnar, sum skulu til bókasøvnini á bygd, verða skrásettar í bókasavnsskipanina og koyrdar til bókasøvnini ella sendar við Posta.***

2025 hevur verið eitt sera virkið ár í Innkeypsdeildini. Í alt hava 234 bøkur verið á sølulistunum, 219 prentaðar bøkur og 15 ljóðbøkur. Tilsamans 1157 eintøk eru farin út til 18 bókasøvn, sum hava verið til sølu á teimum 10 tilboðslistunum, vit hava sent út.

Eisini keypa vit bøkur til Landsbókasavnið, bæði til Føroyadeild og Útlánið, aftrat hesum 234 føroysku titlunum, keypa vit eisini bøkur á fremmandum máli, tær flestu á donskum og enskum. Flestu bøkurnar verða keyptar í bókhandlum í Føroyum og á netinum frá bókhandlum í Danmark og aðrastaðni. Í 2025 hevur Landsbókasavnið keypt 493 bøkur á fremmandum máli til útlánið og Føroyadeild.

Innkeypsdeildin á Landsbókasavninum tekur sær eisini av Koyriskipanini hjá føroysku bókasøvnunum.

# VERKSTAÐURIN

***Landsbókasavnið hevur havt egið bókbindaraverkstað síðani 1986.***

Verkstaðurin tekur sær av innbinding og plasting av bókum hjá Landsbókasavninum og bókasøvnum kring landið. Eisini útvegar bókbindaraverkstaðurin m.a. grindlar og lánarakort, ið verða prentað á verkstaðnum.

Á hvørjum ári ger bókbindarin umsløg til heiðursbrøvini Mentamálaráðið letur til mentanarvirðislønir landsins og til Lesaravirðislønina hjá teimum føroysku bókasøvnunum.

Tað er sera hent at hava verkstað í húsinum, eitt nú tá framsýningar verða settar upp. Verkstaðið er við til bæði smærri og størri framsýningar. Verkstaðið tekur sær eisini av at skera umsløg til bøkurnar/tilfarið, sum verður varðveitt í t.d. Føroyadeildini og Handritadeildini.

# BÓKASAVNSGJALD

***Bókasavngjald er ein samsýning, sum landið letur føroyskum høvundum fyri at hava bøkur, ljóðbøkur, e-bøkur og listaverk teirra tøk á føroysku bókasøvnunum.***

Við høvund meinast rithøvundur, tónaskald, týðari, myndlistafólk og onnur, sum búgva í Føroyum ella uttanlands, og sum ávikavist skriva, týða, prýða ella lesa upp føroyskar bøkur.

Bókasavnsgjaldið verður roknað eina ferð um árið og verður goldið í seinasta lagi 1. desember. Landsbókasavnið umsitur føroyska Bókasavnsgjaldið.

Nýggj kunngerð um býtið av bókasavnsgjaldinum kom í 2025, og broytingin hevur m.a. tær broytingar við sær at upplesarar av ljóðbókunum nú eisini fáa lut í bókasavnsgjaldinum. Eisini verða bókmentir á upprunamáli raðfestar hægri og fáa lutfalsliga størri lut í bókasavnsgjaldinum og týðingar fáa lutfalsliga minni.

Upphæddin á 1.793.000 kr. varð býtt út til 375 rithøvundar, týðarar, listafólk/fotografar, upplesarar, makar og arvingar í 2025.

# UNIVERSITETSBÓKASAVN

***Útbúgving og gransking eru millum hægstu politisku raðfestingar hjá flestu framkomnum londum. Tað snýr seg um at vera í fremstu røð, tá tað kemur til nýhugsan, tøkni og smidligar samfelagsskipanir. Nú trygdarstøðan í heiminum eisini er í rembing, og stríð er um, hvat er rætt ella rangt, hava eisini gamlar dygdir og kjarnuhugtøk hjá bókasøvnum, so sum dannilsi og almenn upplýsing, fingið nýggjan vind í seglini.***

Síðani Landsbókasavnið formliga gjørdist universitetsbókasavn í 2024, hava vit lagt serligan dent á at menna tænastur til lesandi og granskarar, sum jú fáast við gransking og nýhugsan m.a. fyri at menna vitanarstigið í samfelagnum.

Øll nýggj vitan byggir á verandi vitan. Eitt universitetsbókasavn er týðandi partur av undirstøðukervinum sum savnar, skipar og goymir alla vitan. Soleiðis eru vit ein virkin samstarvsfelagi hjá lesandi, granskarum og almenninginum.

### Strategi sum stavnhald og amboð

Í 2025 hava vit serliga arbeitt út frá okkara strategi, sum kallast Landsbókasavnið sum universitetsbókasavn Strategi 2025-2030, og varð samtykt tann 1. apríl 2025.

Eitt universitetsbókasavn kann hava sera breitt virkisøki og nógvar uppgávur. Í einum menningartíðarskeiði er serliga týdningarmikið at raðfesta skynsamt og málrættað. Tí hava vit gjørt hesa strategiina, sum vit brúka sum stavnhald og amboð at raðfesta tíð og orku eftir.

Strategiin byggir fyrst og fremst á bókasavnslógina og tekur útgangsstøði í núverandi bókasavnstænastum og útbúgvingar- og granskingarumstøðum í Føroyum. Haraftrat er endamálið at stuðla undir Strategiætlan 2030 hjá Fróðskaparsetri Føroya.



### Ein blóma við sjey bløðum

Í 2025 hava vit arbeitt á hesum sjey mótunum, sum lýst í strategiini. Ymiskt er, hvussu nógv uppgávurnar fylla, og sumt virksemi breiðir seg sjálvsagt yvir meira enn eitt blað á blómuni.




*7 stategisk mál*

*Fyri at menna Landsbókasavnið sum universitetsbókasavn hava vit valt at arbeiða við 7 stategiskum málum. Hesi kunnu síggjast sjálvstøðug virkisøkir, men eru í fleiri førum samantvinnaði, og eru øll grundarlag fyri einum góðum universitetsbókasavni.*

## FRIS – Faroese Research Information Service

Landsbókasavnið er samskipari av FRIS og hevur ábyrgd av, at granskarar á almennum granskingarstovnum kring landið, lesandi og vitjandi á Landsbókasavninum hava atgongd til útlendskar talgildar grunnar við yrkistíðarritum og dátum. Av hesum stendst nógv samskifti við veitarar av grunnum og við brúkarar her heima. Hetta er eitt umfatandi arbeiðsøki, sum vit dagliga fáast við og menna. Hetta hevur verið eitt serligt fokus í 2025 og væntandi eisini framyvir.

Hvørt ár í oktober eru vit vertir fyri ársfundi hjá luttakandi stovnunum í FRIS-samstarvinum, t.e. almennir granskingarstovnar í Føroyum. Í 2025 eru 11 stovnar við, sum síggjast á myndini.

### Í FRIS-samstarvinum 2025 eru ellivu søvn og stovnar:

- Firum
- Fróðskaparsetur Føroya
- Granskingarráðið
- Heilsustýrið
- Havstovan
- Heilsufrøðiliga starvsstovan
- Landsbókasavnið (samskipari)
- Landssjúkrahúsið
- Sernám
- Tjóðsavnið
- Umhvørvisstovan

Nýggir stovnar kunnu koma við. Vend tær til Landsbókasavnið um nærri kunning.

## Rúmið sum vitanarverkstaður

Í ár hava vit verið glað um at sæð, at nógv lesandi brúka okkara hølisumstøður til sítt arbeiði, bæði til einsæris hugsavnan og bólkaarbeiði.

Lesandi gera eisini nógv brúk av hjálp og samskifti við starvsfólk í móttøkuni. Vit arbeiða fyri at lesandi skulu kenna Landsbókasavnið sum natúrligan part av lestrarumhvørvinum í Føroyum. Tvær deildir á Fróðskaparsetrinum, Føroyamálsdeildin og Søgu – og samfelagsdeildin, hava egin bókasøvn, sum vit røkja í samstarvi við deildirnar. Í samráð við deildirnar hava vit ruddað nakað út og umskipað eitt sindur á hillunum. Á báðum støðum hava vit havt bókavarðatænastu tveir dagar um vikuna – tveir tímar hvørja ferð. Samskiftið er gott við deildirnar, og vit arbeiða áhaldandi við at finna rætta leistin til hvørt av hesum báðum støðum.

## Heimasíðan og miðling

Heimasíðan www.landsbokasavnid.fo er í ár tillagað við trimum høvuðsyvirskriftum: Universitetsbókasavnið, Tjóðbókasavnið og Høvuðsbókasavnið. Soleiðis hevur virksemið hjá universitetsbókasavninum nú fingið sín egna part av heimasíðuni, har vit leggja alla kunning, sum er viðkomandi fyri lesandi, undirvísarar og granskarar. Hetta er okkara fremsti pallur til miðling. Menning og skipan av heimasíðuni er eitt arbeiði, sum vit hava brúkt nógva tíð uppá í 2025, og fara vit eisini at arbeiða nógv við hesum framyvir.

Nakað av samskifti og samstarvi um kunning til lesandi og granskarar hevur verið við Setrið og aðrar granskingarstovnar í ár. Okkara talgilda miðling er fyrst og fremst á okkara heimasíðu, umframt á Facebook og Instagram. Hetta er eitt øki, sum vit framhaldandi vilja raðfesta høgt.

## Undirvísing og vegleiðing

Ein fastur og týdningarmikil táttur eru tær sokallaðu bókasavnskunningarnar, sum vit hava bæði fyri miðnámsskúlanæmingar og lesandi á Setrinum. 15 ferðir í 2025 hava vit antin vitjað í undirvísingarhølunum hjá lesandi ella havt kunningar her á bókasavninum. Greitt verður frá, hvussu tilfarið á bókasavninum er skipað, bæði á hillum og í grunnum á netinum. Serligur

dentur hevur verið lagdur á at vísa og venja lesandi at finna vísindaligar greinar í talgildum grunnum og tíðarritum.

Eitt ítøkiligt framstig í ár er, at vit hava átikið okkum størri leiklut í at læra lesandi at gera keldulistar og at kenna tilvísingarsnið samsvarandi ymiskar akademiskar standardar. Vit hava bæði skrivað vegleiðingar, sum vit hava lagt á okkara heimasíðu og hildið fleiri skeið í hesum. Bæði undirvísarar og lesandi hava tikið sera væl ímóti hesum, og vænta vit at henda uppgávan kemur at fylla meira komandi árini.

## Námshill

Hetta er hillin á bókasavninum, har eitt eintak av øllum tekstum á lestrarlistunum hvørja lestrarhálvu standa. Lesandi kunnu brúka tilfarið á staðnum, men ikki læna tað við heim. Soleiðis tryggja vit, at tað altíð ber til at síggja tilfar, sum hoyrir til undirvísingina. Hetta er eitt samstarv við útbúgvingarleiðarnar, sum senda okkum lestrarlistarnar, og vit skipa hillina.

## Samband millum Landsbókasavnið og Setrið

Flestu brúkarar av universitetsbókasavninum eru lesandi, undirvísarar og granskarar á Setrinum. Tí hevur hetta sambandið og samstarvið serliga raðfesting fyri okkum á universitetsbókasavninum. Vit hava gott samband við lesandi og undirvísarar. Tó er sambandið betri við summar deildir enn aðrar, men vit arbeiða við at røkka longur út. Hetta kann m.a. gerast við at fáa tættari samstarv við ymisku eindirnar á Setrinum m.a. um kunningarátøk og um dagliga kunningarstreymin. Hetta sambandið skal eisini brúkast til at halda okkara menning á eini rættari og viðkomandi kós
.

## Vitlíki

Í 2025 hava vit verið í samskifti við Fróðskaparsetrið – serliga Máltøknidepilin – um vitlíkisverkætlanir, sum tey arbeiða við. Vit hava eisini luttikið á breiðari fundum og verkstovum um vitlíki, har fundast hevur verið um, hvussu vit í Føroyum kunnu taka hesa tøknina til okkum á ein skynsaman hátt. Fleiri almennir stovnar og privat arbeiða við vitlíkisuppgávum. Vit eru fús at samstarva um menning av vitlíki.

Flestu talgildu grunnarnir, sum vit hava atgongd til, hava ment ein møguleika á teirra netsíðu, har brúkarar kunnu fáa hjálp frá einum vitlíkisknøtti fyri at finna viðkomandi tilfar. Í sambandi við vegleiðingar og skeið hava vit eisini víst lesandi á hesar møguleikarnar.

## Luttøka uttanhýsis

Universitetsbókasavnið var aftur í ár við á innleiðsludøgum hjá Fróðskaparsetrinum í Sjóvinnuhúsinum í august, har vit høvdu ein bás og eina framløgu. Høvuðsboðskapur okkara var, at lesandi eiga at síggja universitetsbókasavnið sum sín vitanarverkstað, og at vit eru klár at hjálpa og stuðla teimum.

Í septembur vóru vit við til ársins vísindavøku í Sjóvinnuhúsinum, sum Granskingarráðið skipaði fyri, og har málbólkurin var børn í miðdeild og eldri. Vit vístu m.a. á, at øll bókasøvnini í landinum (uttan Býarbókasavnið í Havn) eru felags um leitigrunnin www.bokasavn.fo, og at øll kunnu læna allastaðni, óansæð hvar í landinum ein býr.

## Tað grør um gangandi fót

Samanumtikið kann sigast, at tað er lív og menning í universitetsbókasavninum. Eftirspurningurin og tørvurin er sjónligur og merkist væl á Landsbókasavninum. Vit hava sjálvandi avmarkaða orku, men arbeiða sambært strategiini, og royna annars at lofta nýggjum avbjóðingum so hvørt tær koma til okkara. Vit fegnast um alt sum spírar og grør, og gleða okkum til framtíðina við blómandi og kveikjandi samstarvi millum undirvísingar -og granskingarstovnar í Føroyum, einstaklingum og samfelagnum at gagni.

# LJÓÐBÓKATÆNASTAN

***Ljóðbókatænastan skal útvega ljóðbøkur o.a. tilfar til teirra, sum av eini ella aðrari orsøk ikki fáa lisið ella á annan hátt fáa ognað sær vanligan prentaðan tekst. Somu-leiðis skal Ljóðbókatænastan skipa fyri, at tilfar av nevnda slagi verður atgeingiligt hjá brúkarunum á bókasøvnum landsins.***

Ljóðbókatænastan hevur lisið inn 16 ljóðbøkur í 2025.

**Av teim 16 ljóðbókunum eru:**

- 2 ljóðbøkur til børn og ung
- 5 ljóðbøkur eru innan fagrar bókmentir
- 7 ljóðbøkur eru skúlabøkur
- 2 ljóðbøkur er innan yrkisbókmentir

Til ber at fara inn á http://lbs.fo at síggja kunning um allar ljóðbøkurnar, sum til ber at læna á fløgum á Landsbókasavninum og á øðrum bókasøvnum eisini.

Niðanfyri er ein nágreiniligari listi við teim 16 ljóðbókunum, framleiddar í 2024:

**Ljóðbøkur til børn og ung:**

- "Sólarris á heystingardegi – Hungursleikirnir 5" eftir Suzanne Collins. Lesari: Gunnvá Zachariassen
- “Tað myrka í mær – Half Bad” eftir Sally Green. Lesari: Barbara Christophersen.

**Ljóðbøkur innan fagrar bókmentir:**

- "Vilstar røtur" eftir Ingun Christensen. Lesari: Ingun Christensen
- "Altartalvan" eftir Jógvan Isaksen. Lesari: Kári Øster
- "List" eftir Eyðun Klakstein. Lesari: Jákup Sørensen
- "Gentan í verðini" eftir Katrin Ottarsdóttir. Lesari: Katrin Ottarsdóttir
- "Summarið varir ikki alt árið" eftir Katrin Ottarsdóttir. Lesari: Katrin Ottarsdóttir

**Skúlabøkur:**

- "Dropar 9" eftir Annelisa Rasmussen, Lív I Magnussen – skúlabók til undirvísing í føroyskum. Sjey ymiskir lesarar.
- "Støddfrøði 8 - grundbók" eftir Grete Normann Tofteberg, Janneke Tangen, Ingvill Merete Stedøy, Bjørnar Alseth – skúlabók til undirvísing í støddfrøði. Lesari: Fríðbjørg Hammer.
- "Støddfrøði 8 - uppgávubók" eftir Grete Normann Tofteberg, Janneke Tangen, Ingvill Merete Stedøy, Bjørnar Alseth – skúlabók

til undirvísing í støddfrøði. Lesari: Fríðbjørg Hammer.

- "Enskt 4" eftir Cecilie Solberg, Hege Dahl Unnerud. Lesarar: Fiona Parker, Daniel Rye, Sólja Ellen Rye
- “Hervør, Høgni og hini" eftir Rannveig Hovgaard, John Næs Berg. Lesarar: Bárður Háberg, Ann Elisabeth Iversen.
- "Hey Føroyar - rættur og rættindi " eftir Lydiu Didriksen – undirvísingartilfar til fólk, ið hava føroyskt sum annað mál Lesari: Ann Elisabeth Iversen.
- “Hey Føroyar – søga og sambond” eftir Lydiu Didriksen – undirvísingartilfar til fólk, ið hava føroyskt sum annað mál. Lesari: Ann Elisabeth Iversen

### Ljóðbøkur innan yrkisbókmentir:

- "Undurfullir heilar" eftir Louise Gooding. Lesari: Beinir Bergsson
- “Havnar søga 6” eftir Jens Paula A. Nolsøe og Kára Jespersen

### Arbeiðið við ljóðbókum

Fleiri av bókunum, sum Ljóðbókatænastan hevur framleitt í 2025, hava verið sera rúgvismiklar. Tær hava tí tikið eyka langa tíð at lesa inn og ritstjórna. Talið av framleiddum bókatitlum er tí minni enn árini frammanundan, men talið av framleiddum minuttum er tó umleið tað sama. Ljóðbókatænastan fegnast um, at tað í 2025 er komin gongd á talgilda útlánið á eReolen, sum er útlánspallurin hjá bókasøvnum í danska ríkinum – eisini í Føroyum. Forløgini hava fingið útflýggjað eina rúgvu av ljóðfílum í 2025, sum Ljóðbókatænastan hevur framleitt burtur úr bókum teirra, og sum tey síðani sjálvi hava lagt út á eReolen.dk og á aðrar talgildar pallar. Reglan sambært nýggju bókasavnslógini, ið kom í gildi pr. 1. januar 2024, er, at Ljóðbókatænastan bert útflýggjar ljóðfílur til forløgini, um tey hava tryggjað sær skrivlig rættindi til at almannakunngera ljóðbøkurnar á netinum, og móti at forløgini lata helvtina av inntøkunum av sølu og útláni av hesum ljóðbókum (Fyri hvørt lán fáa forløgini eina peningaupphædd), til ljóðbókaframleiðslan er dekkað, tó hægst í 10 ár. 2025 var fyrsta árið, har hesar upphæddir vóru avroknaðar við forløgini.

Tað eydnaðist ikki at fáa endaliga samstarvsavtalu við NOTA upp á pláss í ár. Nota.dk er talgildi útlánspallurin fyri fólk við lesitarni í danska ríkinum. Munurin millum Nota.dk og eReolen er, at á Nota.dk ber til at læna óavmarkað tal av ljóðbókum. Nota er í ár lagt undir Kongaliga bókasavnið og hevur í hesum sambandi skift navn til Det Kgl. Biblioteks Nota-service. Arbeiðið við samstarvsavtaluni heldur fram í 2026.

# ÚTLÁNSHAGTØL Á EREOLEN




*Útlánstalið á eReolen fyri øll bókasøvnini í Føroyum var í 2025 21.363, sum er ein hækkan frá teimum 20.428 í fjør. Útlánstalið av føroyskum bókum á eReolen er í ár 2960.*

LANDSBÓKASAVNIÐ